# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, ið gjørdu mær 70 ára føðingardagin ógloymandi. Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit og telefonsamrøður.

Somuleiðis ynskist øllum eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.

**Heilsan Sólgerð Hansen Norðberg**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ein hvønn hátt gleddu okkum á okkara gullbrúðardegi.

Samtíðis vilja vit nýta høvi til at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjar.

**Una og Hjørleif**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt mintust meg á 90 ára degnum, takki eg hjartaliga.

Gleðilig jól og Harrans signað nýggjár.

**Edith Dahl**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið mintust okkum á gullbrúdleypsdegnum 17. november 2004.

Gleðilig jól og gott nýggjár.

**Kærar heilsanir**
**Anna og Johan Petur Johansen**

Tórshavnar Havn 75 ár:

# Vígslan fór fram í ýlandi stormi og grimdarregni



*Hjá Tórshavnar Havn starvast tilsamans 14 fólk. Her er havnarmeistarin Jónsvein Lamhauge (uttast til vinstru) saman við nøkrum av starvsfólkunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**18. desember 2004 verður Tórshavnar Havn 75 ár. Vígslan av havnini fór fram mikudagin 18. desember 1929 í ýlandi stormi og grimdarregni**

Klokkan trý um dagin spældi hornorkestrið "Eg oyggjar veit". So helt býráðsformaðurin talu, og aftaná spældi orkestrið "Det er et yndigt land". Eisini var fýrverk á brimgarðshøvdinum. Seinni um kvøldið var føroyskur og enskur dansur ókeypis í Sjónleikarhúsinum og í Tórshøll, og býráðið bjóðaði til døgurða umborð á ferðamannaskipinum Tjaldrinum, sum lá við nýggju bryggjuna.

Tað var longu í 1866, at havnarfólk ynsktu havnarviðurskiftini betrað, men ikki fyrr enn einaferð í 1920-unum kom gongd á havnabygginguna í Havn.

28. apríl 1905 staðfestir løgmálaráðið eina havnareglugerð fyri Thorshavns Kommunes Havnevæsen, og Johs. Nicolajsen (Jóannes í Pætursastovu) (1857-1933) var fyrsti havnaumsjónarmaður í Havn.

Fyrsti havnarmeistari var Hans Jacob Michelsen (Hans Jakku í Dalólastovu) (1878-1943). Hann var havnarmeistari frá 1. desember 1929 til 31. desember 1941.

Petur Nicolajsen (Petur í Pætursastovu) (1883-1959) var havnarmeistari frá 1. januar 1942 til 31. mars 1954, Sophus Dal-Christiansen (1888-1969) var havnarmeistari frá 1. apríl 1954 til 15. september 1958.

Høgni Mohr var havnarmeistari frá 15. september 1958 til 1. apríl 1988, tá Pauli Hansen bleiv havnarmeistari.

Síðan 1. januar 1993 hevur Jónsvein Lamhauge verið havnarmeistari við Tórshavnar Havn.

Hjá Tórshavnar Havn eru í dag 14 starvsfólk.



*Her verður havnarlagið bygt í 20-unum, og 18. desember 1929 varð Tórshavnar Havn vígd. Alt økið innan fyri (har sum báturin liggur) varð lagt undir heilt*